# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*4. august fingu Beinta Ejdesgaard Bech, Lopra, og Anthon Borgardal, Sandvík, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3750 gr.*

13. september fingu Elin Thomassen og Tróndur G. Joensen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4040 gr.

15. september fingu Rósmari Hellisdal og Jonvard Poulsen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4150 gr.

16. september fingu Barbara Jákupsdóttir, Tórshavn, og Jón Gærdbo, Nes, Vági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3850 gr.

16. september fingu Barbara og Oddmar á Høgabóli, Miðvági, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 3100 gr.

16. september fingu Mariann Poulsen og Trygvi H. Poulsen, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3050 gr.

17. september fingu Óluva og Andrias Poulsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4250 gr.

17. september fingu Kristina og Jákup Tausen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4404 gr. Hann eitur Eyðun Jákupsson Tausen.

17. september fingu Karen Johansen og Ronny L. Olsen, Rituvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

18. september fingu Sigrun og Ingolf Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3850 gr.

18. september fingu Sowali og Jacob M. Jacobsen, Strondum, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3250 gr.

18. september fingu Ragnhild Olsen og John Johannessen, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3175 gr.

18. september fingu Oluffa L. Hansen og Páll Lamhauge, Nesi, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4850 gr.

20. september fingu Eydna og Dávur Johannesen, Klaksvík, ein dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4600 gr.

20. september fingu Vivian L. Guðmundsson og Magnus Wilhelm Dam Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4200 gr.

20. september fingu Sunrid í Gong, Tórshavn, og Jesper Ullum Sundien, Vejle, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3000 gr.

22. september fingu Gunnvør Ey. Mohr og Hanus Iversen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 5000 gr.

22. september fingu Gunnhild Helmsdal og Benjamin Gaasedal, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3550 gr.

22. september fingu Aðalbjørg Linklett og Mortan Jacobsen, Haraldsund, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4300 gr.

23. september fingu Súsanna og Joel undir Leitinum, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4175 gr.

## Minningarorð um
# Justinus Hansen



Týsmorgunin 21. september andaðist Justinus Hansen úr Runavík 88 ára gamal. Ydde, sum hann vanliga var rópur, flutti saman við familjuni av Toftum inn í Runavík í 1949.

Har hevði hann bygt sær hús, og har kom hann at vera alt lívið, til hann nú andaðist sum ein aldrandi maður.

Av teimum, sum tá í tíðini fluttu í grannalagið í fyrstu røð út móti vegnum, eru ikki nógvir eftir, og nú fór so Ydde.

Hann fór annars sum ungur drongur til skips og var á sjónum í fleiri ár, m.a. sigldi hann við Expedit, Mjóvanes og Atlantsfarinum.

Men eftir at hann flutti inn í Runavíkina, hevur hann havt sína dagligu gongd í Lynfrost, har hann hevur skorið flak síðani 1953, - fyrst við hond og seinnu árini staðið við flakamaskinurnar, og annars gjørt alt fyrifallandi fiskaarbeiði, heilt til hann gavst væl uppi í sjeytiárunum.

Hann treivst væl í arbeiðinum, og var hann altíð í góðari tíð um morgunin, so hann kundi byrja arbeiðið stundisliga.

Eftir at hann var givin á Lynfrost, var hann mest heima við hús, har hann tókst við okkurt fyrifallandi, eins og hann hugnaði um seg og síni.

Ein vanlig bygdarmynd var at síggja Ydda á súkklu, har hann var á veg at gera onkur ørindi, ella hann, hellandi niður á súkkluna, tók sær stundir til eitt prát.

Ydde var giftur við Ellu, og áttu tey 8 børn: Jóhannus, Hilmar, Ragnhard, Sólrun, Ruth, Hanna, Julianna og Fríðbjørg.

Ella doyði fyri nøkrum árum síðani, og nú doyði so Ydde, og við teimum báðum, er ein kend bygdarmynd ikki millum okkum meira.

Vit minnast tey við virðing.

**Skyldmaður**

# Amariel í Glarsmiðjuni

Sunnudagin 26. september kl. 15 – 18 letur Amariel Norðoy upp listaframsýning í Glarsmiðjuni í Bøgøtu 16 í Havn.

Mikladalur og tað skiftandi ljósið er tema fyri hesi framsýning.

Opið verður soleiðis: Mánadag frá kl. 13-17.30, týsdag-hósdag frá kl. 10-17.30, fríggjadag frá kl. 10-18.00, og leygardag frá kl. 10-12.30

Framsýningin verður opin til 2. oktober.



*Frá sunnudegnum 26. september til 2. oktober hevur Amariel Norðoy listaframsýning í Glarsmiðjuni í Bøgøtu 16 í Havn*



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

40 ára starvsdagur

# Dánjal Vang, lærari í Fuglafjarðar skúla 1964–2004



Í august hevði Dánjal Vang, lærari, starvast í 40 ár í Fuglafjarðar skúla.

Dánjal Vang er føddur 21. februar 1940 á Tvøroyri. Hann er sonur Paula Eliesar Vang av Hamri í Froðba og Onnu Kathrinu f. Jacobsen úr Sandvík. Dánjal misti mammu sína av sjúku longu sum 2 ára gamal, og pápin datt oman sum 57 ára gamal. Dánjal er giftur við Kathrinu f. Olsen úr Klaksvík. Tey eiga trý børn: Joan, Palla og Árna.

Eftir at hava tikið realprógv á Tvøroyri í 1956 starvaðist Dánjal sum krambakallur hjá Nordafar í Føroyingahavnini tað summarið. Heimafturkomin hevði hann fyrifallandi arbeiði, til hann í januar 1957 fór við íslendska trolaranum »Skúla Magnussyni« til Reykjavíkar í Íslandi. Dánjal royndi seg eisini sum egnara fyri bátin »Fylkir« á Akranesi. Út á summarið í 1957 fór hann við garnabátinum »Skipaskaga«, og royndu teir fyri tað mesta undir Jøklinum. Seinni var hann eisini við trolaranum »Torkel Mána« úr Reykjavík. Teir royndu í Vesturgrønlandi og gjørdu eisini ein ísfiskatúr á Halanum við Ísland.

Seint á heysti í 1957 byrjaði skúlagongdin hjá Dánjali á Krabbesholm Háskúla í Skive í Danmark, har hann í juni 1958 stóð upptøkuroyndina til at koma á Skive Seminarium, har hann tók læraraprógv í juni 1962.

Skúlaárið 1962/63 var Dánjal lærari í skúlanum í Hee, sum liggur stutt norðan fyri Ringkøbing. Skúlaárið 1963/64 var hann lærari í skúlanum í Hvide Sande. Frá 1. august 1964 varð Dánjal Vang settur sum lærari í Fuglafjarðar skúla, og her hevur hann arbeitt uttan slit í 40 ár.

Dánjal hevur ofta tikið til, at árini í Danmark vóru stak góð. Hann lærdi ein hóp av teirra mentan, sum hann kundi brúka aftur í Føroyum. Hann smæðist ikki fyri at verja Danmark og danir, tá ið onkur óvitandi og órættvíst hevur hug at finnast at teimum og teirra samfelagi. Ofta hoyrir tú hann eggja til at skipa føroyska samfelagið betur, m.a. við at læra av, hvat aðrir í Norðurlondum hava gjørt.

Dánjal hevur verið skúlanum ein góður og dugnaligur lærari. Trúliga hevur hann undirvíst í serliga donskum og støddfrøði. Seinnu árini hevur hann eisini alsamt tikið sær av fleiri tímum í serundirvísing. Tað eyðkennir Dánjal, at hann er nærlagdur. Hann fer grundiga til verka og byggir upp so líðandi, so børnini kunnu fylgja við og læra tað, tey skulu. Hann tekur børnini til sín og er góður við tey.

Sum lærari og seinni sum skúlastjóri havi eg nógv at takka Dánjali fyri. Hann er ein álítandi og góður starvsfelagi, og hann er skjótur við eini hjálpandi hond, tá ið tørvur er á tí. Hann sigur sína meining týðuliga og greitt, og hann ber ikki agg, um tú ikki ert samdur við honum. Ofta dugir hann at síggja møguleikarnar, heldur enn forðingarnar. Hann hevur eitt lætt og positivt sinnalag. – Ofta hoyrist góður og lívgevandi látur runga frá honum.

Dánjal er fallin væl til í Fuglafirði. Skjótt gjørdist hann ein partur av bygdasamfelagnum. Á Bókasavninum starvaðist hann í árunum 1966-75. Hoyrdi Sverra Egholm, sála, sum tá var landsbókavørður, siga, at av bygdabókasøvnunum í Føroyum var tað í Fuglafirði eina fremst, ikki minst Dánjali fyri at takka.

Dánjal var eisini kassameistari hjá ÍF í árunum 1970-74, og eisini her vísti hann skil og hegni. Inntøkur og útreiðslur skuldu fylgjast, og hann legði stóran dent á at fáa roknskapirnar grannskoðaðar av statsautoriseraðum fólki, sum ikki var so vanligt tá.

Í ógvuliga mong ár sat Dánjal sum nevndarlimur í FK í Fuglafirði. Har byrjaði hann í 1966, og røkti hetta starv til fyri stuttum.

Í barnaverndarnevndini hevur Dánjal verið limur í árunum 1988-92.

Í skúlanevndini hevur Dánjal verið limur í árunum 1970-76, 1984-92, 1977-2000 og síðan 2000 í skúlastýrinum sum umboð fyri Fuglafjarðar kommunu.

Síðan 1. Januar 1997 hevur Dánjal verið býráðslimur í Fuglafirði.

Góði Dánjal! Ein so virkin maður stendur sjáldan einsamallur. Kathrina, kona tín, hevur trúliga staðið tær við lið í øll hesi ár. Saman við børnum tykkara hava tit nógv at fegnast um til eina hátíðarløtu sum hesa. Skúlans vegna fari eg at siga tær hjartaliga takk fyri trúgva og drúgva tænastu við skúlan. Stóra takk fyri gott samstarv hesi mongu árini. Hjartaliga tillukku við starvsdegnum við ynskjum um Guðs ríku signing fyri teg og tíni.

**Súni Hjøllum, skúlastjóri**

## Andlát

15. september
Torleif Hovgaard, nevndur Venne, Vági, bús. í Allerød, 77 ár

17. september
Símun Karl Mikkelsen, úti í Grønlandi, Tórshavn, 78 ár.
Bjørghild Jørgensen, fødd Poulsen, úr Havn, 76 ár.

19. september
Oluf Skaalum, í Hvalba, 80 ár.

20. september
Sigrid Jacobsen, í Klaksvík, vanliga nevnd Sigrid í Búðunum, 92 ár.

21. september
Jústenes Hansen, Runavík, vanliga nevndur Yddi, 88 ár.

## Dagurin

**25. september. Kleofas**. Annar av lærusveinunum, sum á veg til Emmaus hittu hin upprisna (Luk. 24. 13-35).

**26. september. Adolf**, deyður umleið 824. Sonur muslimskan pápa og kristna móður í Sevilla. Flutti til Cordoba í vón um at hava kristnu trúgv sína í friði, men varð klagaður og tikin av døgum.

Týskt navn ið merkir *aðalborin, úlvur.*

**27. september. Kosmus** (eisini skrivaður Cosmas), deyður umleið ár 300. Tikin av døgum undir Diocletianus keisara.

## 80 ár

Sunnudagin 26. septembur verður Kaj í Bartalstovu, Syðrugøtu, 80 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl. 15.00.

## Prógv

Astrid Marnersdóttir Hansen úr Klaksvík, býr í Teglvænge 3, 6622 Bække, Jylland, varð 30. sept. liðug sum mediegrafikari. Hon hevur lært hjá P.E. Offsett og Reklame í Varde.

Tann 17. sept. tók Jens Petur Eilifsson Weihe, Sørvági, prógv sum cand. merc. aud á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn. 1. oktober byrjar hann í starvi hjá KPMG í Keypmannahavn innan fyri KT-revisión.

Jari í Hjøllum, Toftir, hevur 13. september á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn lokið prógv sum cant.scient. í alisfrøði.

## Brúdleyp

Hósdagin, 23. september, *giftust* í Runavík, Hansa Sivertsen úr Klaksvík og Hardi Hansen úr Norðragøtu. Tey eru búsitandi í Norðragøtu og eiga tveir synir, sum eita Rani og Tóri.

Í dag, 25. september, giftast Dóra Dagbjartsdóttir Johansen og Jan Gaard Joensen, bæði úr Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 15.00 og veitsla fyri innbodnum á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Í dag, 25. september, kl. 13.00 giftast í Kvívíkar kirkju Áki Gaardbo Olsen, Vestmanna og Sóllind á Sondum Estbú, Sandur. Dagurin verður hildin í miðhøllini í Vestmanna skúla frá kl. 15.00 til kl. 19.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum mongu,
sum mintust til mín og gleddu meg
á 80 ára føðingardegnum 22. august.

**Jens Jacob í Hjøllum**
**Toftir**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálp,
tá mín høgt elskaða mamma, vermóðir, omma
og systir okkara

**Elin Petersen**
**vanliga nevnd Elin í Puntabyrgi**
**Tvøroyri**

doyði og varð jarðað.

Takk til prestar, sangarar og berarar.
Takk fyri kransar, blómur og til tykkum, sum sendu peningagávu til Føroya felag móti krabbameini.
At enda vilja vit takka tykkum øllum, sum fylgdu Elini til hennara seinasta hvíldarstað her á foldum.

*Familjunnar vegna*

**Dagmar, Heri, Hjørleif, Páll og Kristin**